**Flogbóltsstøður**

**Meistaradeild kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 16 | 11 | - | 5 | 39 | 28 | 11 | 15 |
| 2 SÍ | 15 | 10 | - | 5 | 35 | 24 | 11 | 14 |
| 3 Dráttur | 16 | 10 | - | 6 | 37 | 30 | 7 | 13 |
| 4 TB | 15 | 8 | - | 7 | 30 | 23 | 7 | 10 |
| 5 KÍF | 16 | 6 | - | 10 | 31 | 34 | -3 | 10 |
| 6 Mjølnir | 16 | 2 | - | 14 | 12 | 45 | -33 | 2 |

**Meistaradeild menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 13 | 11 | - | 2 | 35 | 16 | 19 | 15 |
| 2 Mjølnir | 12 | 9 | - | 3 | 30 | 17 | 13 | 12 |
| 3 Fram | 13 | 7 | - | 6 | 26 | 26 | 0 | 10 |
| 4 Fleyr | 13 | 4 | - | 9 | 19 | 31 | -12 | 6 |
| 5 SÍ | 13 | 1 | - | 12 | 18 | 38 | -20 | 1 |

KÍF-ÍF 3-1 (25-19, 25-15, 17-25, 25-16):

# KÍF bukaði oddaliðið

**Flogbóltskvinnurnar hjá KÍF hildu fram við síni sigursrøð, tá tær vunnu tryggan sigur á oddaliðnum, ÍF, í Kollafirði í gjárkvøldið. Við sigrinum hava tær nú vunnið fýra dystir á rað**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

KÍF hevur havt eitt heldur ójavnt kappingarár í meistaradeildini hjá kvinnum, har tær stóran part av árinum hava havt trupulleikar at avgera sínar dystir. Í seinastuni hevur tó borið til. Síðstu tríggir dystirnir eru nevniliga endaðir við sigri, og mikukvøldið skuldu tær aftur í dyst, tá tær tóku ímóti oddaliðnum úr Fuglafirði.



*KÍF vann ein fult uppibornan sigur á oddaliðnum, ÍF mikukvøldið. Hetta var fjórði sigurin hjá KÍF á rað, og nú byrja tær veruliga at nærkast heiðursmerkjum.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### KÍF er flúgvandi

Nógv fólk vóru komin saman í høllini í Kollafirði hetta kalda vetrarkvøld, tá ið KÍF tók ímóti ÍF. Høvdu tey væntað sær ein spennandi dyst, so fóru tey skuffaði heim aftur, tí spenningur kom sum so ongantíð í dystin. Til tess var munurin á liðunum alt ov stórur henda dagin.

Í fyrsta setti fylgdust liðini leingi, men mitt í settinum dró KÍF frá, og eftir hetta var eingin slingur í valsinum. Tær vunnu ein tryggan 25-19 sigur, og so høvdu tær lagt støðið fyri restini av dystinum.

Í øðrum setti byrjaðu kvinnurnar úr Kollafirði har, sum tær høvdu slept í fyrsta setti. Tær fóru frá ÍF beinanvegin, og eitt skifti førdu tær heili 15-3. Móti endanum kom ÍF tó eitt sindur betri við í hetta settið, men leiðslan hjá KÍF kom tó ongantíð í vanda, og tær vunnu eisini hetta settið trygt, 25-15.

Nú mundu flest øll vænta, at KÍF eisini fór at taka sær av triðja setti, og fyrstu løtuna sá eisini væl út. Mest sum alt fyri eitt løgdu tær seg á odda við seks stigum, men so steðgaði upp. Frá at vera aftanfyri 9-12 megnaði ÍF at vinna seg upp á 19-13, og so var triðja sett í roynd og veru avgjørt. ÍF vann hetta 25-17, og so var spenningur í aftur dystinum.

Spenningurin helt sær tó ikki leingi, tí í fjórða setti var KÍF aftur oman á. Eftir eina javna byrjan, har liðini fulgdust í eina løtu, dró KÍF frá mitt í settinum. Móti endanum var slett eingin ivi, og KÍF vann fjórða sett 25-16. Harvið tryggjaðu tær sær tann fjórða sigurin á rað, og nú byrja tær veruligaatnærkastheiðursmerkjunum.

### Uppiborin sigur

Liðið hjá KÍF má sigast at vera nógv broytt síðstu dystirnar. Leikararnir eru teir somu, men nú eru tær brádliga byrjaðar at vinna sínar dystir. Sigurin ímóti ÍF var eisini fult uppiborin, og sjálvt um ÍF fekk spenning í dystin, tá tær vunnu triðja sett, so var at kalla eingin sum helst ivi um úrslitið.

Blokkurin hjá KÍF hevur verið sera góður síðstu dystirnar, og hesin gav eisini álopinum hjá ÍF stórar trupulleikar. Hetta var tó ikki einasti munurin á liðunum. KÍF tóktist eisini spæla meir fjøllbroytt í sínum álopsspæli, og hetta gjørdi tað ofta ringt hjá ÍF at lesa av, hvaðani álopini fóru at koma. Sum heild ein fult uppiborin sigur til KÍF, og megna tær at halda fast um góða spælið, so er ikki óhugsandi, at tær fara at enda millum trý tey ovastu.

Fram-ÍF 3-2 (10-25, 25-20, 27-25, 22-25, 15-13):

# Fram steðgaði fuglfirðingum

**Fram steðgaði sigursrøðini hjá ÍF í meistaradeildini hjá monnum í gjárkvøldið, tá teir vunnu ein javnan og spennandi dyst. Nú er dysturin um meistaraheitið aftur púra opin**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Lagt var upp til ein spennandi dyst í Hoyvíkshøllini í gjárkvøldið, tá Fram tók ímóti oddaliðnum, ÍF, í meistaradeildini hjá monnum. Í undanfarnu dystunum millum liðini hevði ÍF havt munin, og vunnu teir henda dystin, so kundu teir taka eitt stórt fet ímóti meistaraheitinum. Fram vildi tó ikki lata sær lynda við enn einum tapi, tí teir vunnu nevniliga dramatiska dystin eftir javnbrótara, og við sigrinum hava teir veruliga blást lív í aftur dystin um meistaraheitið.

Í fyrsta setti var annars einki, sum bendi á, at Fram fór at hava nakran møguleika henda dagin. ÍF stutt og greitt blásti heimaliðið av vøllinum. Gestirnir úr Fuglafirði løgdu seg á odda alt fyri eitt, og Fram fekk slett ikki fótin fyri seg í hesum settinum, sum endaði heili 25-10 til ÍF.

### Fram fekk gongd á

Í øðrum setti vóru spælararnir hjá Fram tó vaknaðir, og nú gekk heldur javnari á. Tað tóktist tó, sum Fram hevði munin í hesum settinum, og móti endanum drógu teir eisini frá ÍF, soleiðis at teir vunnu annað sett 25-20.

Triðja sett var enn javnari, og her var at kalla slett eingin munur á liðunum. Enn einaferð megnaði Fram tó at hála seg fram við ÍF í seinastu bóltunum, og hetta settið vunnu teir eisini. Hesaferð gjørdist úrslitið 27-25, og nú var tað brádliga Fram, sum lá betur fyri at vinna dystin.

Nú sóu fulgfirðingarnir tó, hvønn veg tað bar, og í fjórða setti fingu teir aftur rætta uppá spælið. Teir vóru heldur betri við allan vegin, og ÍF megnaði eisini at vinna hetta settið 25-22, og so skuldi ein javnbrótari til fyri at finna ein vinnara.

Hesin javnbrótarin gjørdist sera javnur og spennandi, men í seinastu bóltunum hevði Fram betru nervarnar. Teir vunnu 15-13, og sostatt tryggjaðu teir sær sín fyrsta sigur ímóti oddaliðnum, ÍF, í ár.

Við sigrinum hevur Fram eisini blást nýtt lív í oddastríðið, har Mjølnir nú hevur ein hampiligan møguleika at finga ÍF aftur.

# Bridge-finalurnar á skránni

**Steypakappingin í Bridge skal avgerast leygardagin, og longu nú stendur greitt, at oddaliðið í fyrstu deild ikki fær hond á steypið**

BRIDGE
*tíðindaskriv*

Leygardagin 10. februar verða hølini hjá Dimmalætting á Smyrilsvegi í Havn karmurin um hálvfinalur og finalu í steypakappingini í bridge 2007. Per Kallsberg og hansara menn: Dánjal Pauli Mohr, Jóannes Mouritsen og Heðin Mouritsen vunnu á liðnum hjá Boga Simonsen í undankappingini, so oddaliðið í fyrstu deild er ikki millum tey fýra, ið kappast um ferðasteypið frá Trygd.

Liðini hjá Áranti Berjastein og Allani Dal-Christiansen eru bæði mannað við sterkum spælarum úr fyrstu deild, og bæði kunnu enda sum vinnarar av kappingini. Árant spælir saman við Símini Lassaberg, meðan Marner Joensen og Arnbjørn Sivertsen manna hitt parið á liðnum. Allan Dal-Christiansen og Robert Langgaard eru á liði saman við Róa á Rógvu Joensen og Jógvani Juel Rasmussen. Danny Danielsen stendur á odda fyri fjórða liðnum í hálvfinaluni. Hann og makkarin Jens Pauli G. Nolsøe spæla í aðru deild meðan hitt parið á liðnum: Hanus Bærentsen og Eyðbjartur Danielsen ikki eru við í deildarkappingi. Tey 32 spølini í hálvfinaluni verða í mótbrekku fyri teir fýra, uttan mun til, hvørt av hinum liðunum teir skulu spæla í móti.

Byrjað verður klokkan 10 og hálvfinalurnar eru liðugt spældar klokkan 14. Sjálv finalan er 40 spøl og byrjar ein tíma seinni. Vinnandi liðið fær eisini 8.000 krónur sum figgjarligt ískoyti til luttøku í Vingsted Bridge Festival í Danmark komandi summar.